


# Í bókahandlum frá 3. juni.

## Hvørji spor seta vit eftir okkum, tá vit byggja land?

**At byggja land er sera samansett fyritøka, ið kann vera ítøkilig sum ein brúgv og abstrakt sum ein samleiki. Teksturin í hesum riti flytur seg millum hesar støddir og knýtir tær saman.**

**Rithøvundar eru Firouz Gaini og Helgi Jacobsen.**

LANDSVERK
*byggir land*

SENDISTOVAN



savnsmynd

ENDURLÝSING

# SKRIVSTOVAN HJÁ HØVUÐSBARNAVERNDARNEVNDINI SØKIR EFTIR TVEIMUM FÓLKUM VIÐ HÓSKANDI AKADEMISKUM FØRLEIKA

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

Vit sóknast eftir tveimum fólkum, ið hava løgfrøðiliga ella aðra viðkomandi universitetsútbúgving til skrivstovuna hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Talan er um eitt fast starv og eitt avloysarastarv vegna barnsburðarfarloyvi.

Nýggj barnaverndarlóg kom í gildi 1. januar 2006 og hevur hon ført við sær umsitingarligar og fyriskipanarligar broytingar á barnaverndarøkinum.

Uppgávan hjá skrivstovuni er at fyrireika mál og at tryggja, at málini eru nóg væl upplýst, áðrenn tey verða løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar. Umframt at tulka løgfrøðilig ivamál, eisini at savna saman hagtøl um m.a. umsorganaryvitøkur, og í samstarvi við aðra deild á Almannastovuni at lýsa tørvin á stovnsplássum í Føroyum. Í samstarvi við aðra deild á Almannastovuni umsitur skrivstovan fíggjarviðurskiftini í sambandi við virksemið hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Í samstarvi við aðra deild á Almannastovuni umsitur skrivstovan fíggjarviðurskifti, ið eru tengd at virkseminum hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Í arbeiðinum kemur tú at hava tætt samskifti og samarbeiði við tær kommunalu barnaverndartænasturnar og barnaverndarstovnarnar undir landinum.

Tú verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at tú dugur at arbeiða sjálvstøðugt, hevur góð samstarvsevni, góð evni at orða teg skrivliga sum munnliga og hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum, men eingin treyt.

Tú verður sett/ur við tilvísing til Mariu Jacobsen, deildarleiðara á Stjórnarskrivstovuni á Almannastovuni.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara, ella Biritu Viderø, fulltrúa, á telefon 35 35 10, 21 54 91 ella 21 54 78.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 30. juni 2008, kl. 12.00. Vinarliga merkið brævbjálvan "Høvuðsbarnaverndarnevndin".

**Høvuðsbarnaverndarnevndin**

Nevndin tekur avgerðir sambært barnaverndarlógini í málum:

- har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleika ella barnið yvir 15 ár um umsorganaryvirtøku og setan heiman - á stovn ella til fosturs
- um forboð ímóti flyting heimaftur av einum barni, sum er sett heiman við samtykki foreldranna
- um samverurætt barnanna og foreldranna í sambandi við umsorganaryvirtøku og skipan av hesi
- um familjuviðgerð á stovni hjá landinum og tilboði um serdagstovn til børn
- um góðkenning av bráðfeingisavgerðum og um rætt til ókeypis umboðan í málum um, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleika ella barni yvir 15 ár.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA